**Board 24. Dealer West. None Vulnerable.**

North:
♠ J T 7 6 4
♥ A T 9
♦ J T 9 8 7
♣ -

West:
♠ 2
♥ Q 3
♦ A
♣ K J T 8 7 6 4 3 2

East:
♠ K 9 8 3
♥ K 8 6 4 2
♦ 6 5 2
♣ Q

South:
♠ A Q 5
♥ J 7 5
♦ K Q 4 3
♣ A 9 5

| V Versace | N Lassaberg | E Sementa | S Dam |
|---|---|---|---|
| 5♣ | pass | pass | D |
| pass | 5♦ | pass | pass |
| pass | | | |

Útspæl: ♣Q

*Arnbjørn Sivertsen skrivar:*

Sigurin á Italia er uttan iva størsta løta í føroysku bridgesøguni higartil. At Bogi Simonsen í hesum dystinum leikti sín landsdyst nummar 100 setti eyka dám á løtuna. Vit, sum minnast, tá Føroyar í 2002 í sínum fyrsta EM dysti nakrantíð leiktu móti júst Italia og taptu dystin 0-25, har Bogi og Rói eisini leikti við, vistu jú, at teir høvdu "eina hønu at plukka" við italiumenninar.

Eg sat allan dystin undir liðini á Símuni og hugdi, og serliga dámdi mær hetta spælið, har Versace við sínari 5♣ sperrimelding legði trýst á føroyska parið. Árni duplaði, og Símin skuldi velja millum at melda 5♦ ella 5♠. Eisini umhugsaði hann at melda 6♣ fyri at biða Árna velja ein lit, men tað hevði hondin ikki styrki til. Símun valdi at melda 5♦. Um Árni hevði hinar báðar litirnar, kundi hann meldað 5♥, og so hevði Símun flutt í 5♠.

5♦ var rætta kontraktin, og okkara menn fingu lættliga 11 stikk, mótspælið fekk eitt hjartarastikk og trumfess. Í hinum rúminum meldaðu italiumenn 6♦, sum var eitt ov høgt. 10 IMP til Føroyar.

Og hjartaliga til lukku við sigrinum, dreingir!